# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Karsten góð kort

Karsten Hansen tekur seg úr sínum flokki. Tað hevur hann boðað Tjóðveldisflokkinum frá í gjárkvøldið. Karsten Hansen sigur, at hann ikki kann fara upp á komprimis við sína andaligu sannføring, og tí hevur hann tikið hesa avger. Fyri Norðoyatingmannin hevur hetta verið ein ómetaliga trupul avgerð at taka, tí Tjóðveldisflokkurin hevur alt tað tingmaðurin kann minnast verið ein partur av hansara dagligdegi. Tjóðveldisflokkurin hevur fylgt ómetaliga nógv hjá honumn, men tað andaliga hevur altíð havt eitt størri pláss, sigur hann. Tingmaðurin metir ikki, at hann kann ganga uppá kompromis við hetta, og tí hevur hann lurtað eftir síni samvitsku, sigur Karsten Hansen við Portalin. Karsten Hansen fer nú at hugsa um hvussu hansara framtíð kemur at síggja út, og hevur ikki tikið nakra avgerð um hann fer í annan flokk ella ikki. Kortini sigur hann so mikið sum, at hansara politiska sannføring enn er hin sama.

Finnur Helmsdal var annar av uppskotsstillarunum í málinum, sum nú er orsøk til, at Karsten Hansen hevur tikið seg úr Tjóðveldisflokkinum, og hann harmast um avgerðina sum Karsten Hansen tikið. Við Portalin sigur Finnur Helmsdal, at tað harmar hann almikið, at Karsten Hansen nú hevur tikið avgerð um at fara úr flokkinum. Enn er ongin avgerð tikin um, hvør verður komandi næstformaður hjá flokkinum, og heldur ikki er greitt, í hvønn mun hetta fer at ávirka nevndararbeiðið hjá Tjóðveldisflokkinum.

Tað er ikki so óvanligt, at tingmenn taka seg úr flokki sum mótmæli móti politisku kósini hjá avvarandi flokki ella orsakað av persónligum ósemjum. Stundum eru slíkar avgerðir meira at meta sum eitt mótmæli, og endar hetta tá ofta við, at viðkomandi tingmaður eftir eitt ávíst tíðarskeið kemur aftur í flokkin. Er ósemjan hinvegin av djúpum hugsjónarligum slagi, kann eitt slíkt mál enda við, at viðkomandi tingmaður antin fer í annan flokk, ella ger nýggjan flokk ella fer heilt úr politikki. Tað er ilt at siga, hvat, ið er galdandi fyri Karsten Hansen. Hann hevur verið ein sera virkin og dugnaligur politikkari og fyri alt tað púra kompromisleysur. Tað vísti hann, meðan hann var fíggjarmálaráðharri, har ein mangan kundi ivast í, hvør ið veruliga hevði valdið í flokkinum, fíggjarmálar´ðaharrin ella løgmálaráðharrin. Hinvegin er hann so samangrógvin við flokkin, at ein illa fær seg til at trúgva, at hann megnar at venda flokkinum bakið med alla. Heldur vendir hann aftur t.d. á Ólavsøku við hørðum treytum fyri at koma inn aftur. Karsten Hansen er ein politikkari, sum Tjóðveldisflokkurin illa kann vera fyri uttan, og stendur hann tí ikki minni sterkur í dag enn í gjár. Hendingin kemur flokkinum sera illa við, og hugsandi er, at flokkurin er til reiðar at toyggja seg langt fyri at fáa Karsten Hansen inn aftur um flokksdyr. Hann hevur tí sera góð kort á hondini og spennandi verður, hvussu hann fer at spæla tey. Livst so spyrst.

**Sosialurin**

# Rúmligur arbeiðsmarknaður

Á álitisfólkafundi í Almanna- og heilsurøktarafelagnum fríggjadagin 8. desembur hoyrdu vit ein fyrilestur m.a. um tiltøk og fyriskipanir í sambandi við skerdan arbeiðsførleika. Ásannandi at arbeiðið í almanna – og heilsuverkinum kann vera ógvuliga slítandi sálarliga og kropsliga, heita vit á avvarðandi mynduleikar at arbeiða miðvíst við ætlanum, ið stuðla uppundir at fólk kunnu verða verandi í arbeiði, hóast arbeiðsførleikin eitt tíðarskeið er skerdur ella varandi skerdur vegna sjúku ella annað. Sjúkrameldingar eru kostnaðarmiklar fyri samfeløg, og er tað tí fyrst og fremst fyribyrging av at fólk verða sjúkrameldað, ella at tey fara úr starvi í úrtíð, vit mugu arbeiða við. At fyribyrgja krevur fyrst og fremst at arbeiðsplássini hava eina starvsfólkanormering, ið er hóskandi til teirra virksemi. Hetta at fyribyrgja at fólk verða overvað bæði krops- og sálarliga. Somuleiðis eru hjálpartól ógvuliga týdningarmikil, eins og frálæra í røttum arbeiðsstøðum og hjálpartólum eigur at vera ein sjálvfylgja. Kanningar vísa at fólk, ið fara úr arbeiði vegna sjúku, hava torført at koma aftur í arbeiði, longu tá tey hava verið úr arbeiðinum í ein mánaða. Tí er tað í grannalondunum vanligt at hava umsorganarsamrøður, tá ið starvsfólk hevur verið sjúkrameldað í ein mánaða. Starvsfólkið og leiðarin hava tá eina samrøðu, ið hevur til endamáls at viðgera støðuna hjá starvsfólkinum í sambandi við sjúkuna. Møguliga kunnu tey, ta tíðina arbeiðsførleikin er skerdur, finna eina loysn á arbeiðsplássinum, ið tekur atlit til sjúkuna hetta tíðarskeiðið starvsfólkið er sjúkt, tí tá er stórur møguleiki fyri at starvsfólkið varðveitir sítt arbeiði. Hetta kann til dømis gerast við lutvísari sjúkramelding. Í sambandi við lutvísari sjúkramelding er tó týdningarmikið at hava í huga, at normeringin á arbeiðsplássinum ikki verður skerd, soleiðis at tað gongur útyvir hini starvsfólkini. Arbeiðsgevarin er tá noyddur at taka inn eyka fólk at røkja uppgávurnar, ið viðkomandi er sjúkrameldaður frá, tí annars verða øll hini starvsfólkini, ið noyðast at taka eyka nógvar tungar uppgávur uppá seg, skjótt niðurslitin.

Almanna- og heilsurøktarafelagið mælir til smidligar loysnir á arbeiðsmarknaðinum fyri øll starvsfólk, soleiðis at vit øll fáa ein týðandi leiklut á arbeiðsplássinum.

**Álitisfólkini og forkvinnan í Almanna- og heilsurøktarafelagnum**

# Vil Bill Justinussen avtaka næstakærleikan?

*Svar til greinina "Ryggbrotið samfelag"*

**GUNNAR ISFELD**
lesandi

Bill málbær seg sera skelkandi 14. desembur í Sosialinum. Hann nevndi fleiri ferðir næstakærleika, men hvørja ferð setti hann hesa kardinaldygd í kristindóminum í eitt ringt ljós. Í staðin undirstrikaði hann guds*óttan*. Altso er óttin fyri Gudi tað sentrala fyri Bill! Óttin fyri Gudi og óttin fyri útheiminum: alheimsgerðin, minnilutar, tolsemi! Ja alt nýtt.

Kærleikin er sostatt nakað vit mugu ansa eftir. Sambært Bill (og floksfelagum? – vóni tað ikki). Vit mugu, um vit fylgja logikki Bills, ansa eftir, at vit ikki vísa "yvasomum" bólkum okkara høgtvirdað næstakærleika, tí "hini" hava ikki sama hugburð!? Eiga tey ikki kærleika?

Hetta næstakærleikaBOÐ, sum stendur í Gamla Testamenti, øllum evangeliunum (beinleiðis ella óbeinleiðis) og Paulus tekur eisini hetta boð fram í sínum brøvum. Hetta boð vil Bill Justinussen síggja stórt uppá og heldur leggja dent á tað meira autoritera hugtakið: óttan. Jamen so livdi Jesus til onga nyttu!

Og so roynir Bill at sverta altjóðagerðina til. Hvør var tað, sum áheitti sínar lærusveinar, at teir skuldu gera øll fólk til lærusveinar sínar? Var hetta ikki tað fyrsta ella í øllum førum tað største stiðið fram ímóti eini alheims- ella altjóðagerð, sum heimurin hevur sæð?

**Alheimurin, Islam og Europa**

Bill tekur, sum so nógv onnur í síðstani, eisini Danmark fram, sum eitt "ræðandi" dømi, har tolsemi og næstakæeleikin hevur fingið ov fríar teymar(!). Eitt nú islamofobiin skínur her ígjøgnum. Ja tað eru nógv, sum halda tað, at kristindómurin ikki er sterkur nokk við sínum næstakærleika til at standa ímóti einum slíkum átrúnaði sum islam. Her má eg líka koma við nøkrum fakta: Europa, Norður- og Suðuramerika, Afrika og Australia hava kristindóm sum majoritetsátrúnað! Og Ásia hevur eins nógvar hinduistar og næstan eins nógvar buddistar sum muslimar. Ja sjálvt tann síðsti heimsparturin, Antarktis, er domineraður av kristnum tjóðum!

Einaferð var Europa tó meiri merkt av hóttan frá einum islamskum imperii: Osmanniska Turkaland. Hesir turkar høvdu Balkanhálvoynna undir sær í 500 ár, tó eru muslimar bert ein lítil minniluti, og hava altíð verið tað, her á hesari hálvoyggj.

Ein kundi eisini nevnt Spania í Miðøld, har arabarar vóru í fleiri hundrað ár. Tað eg vil við hesum er bert hetta: antin eru hesir muslimar nógv mildari enn nógv fólk í dag vilja vera við, ella er kristindómurin nógv sterkari enn fólk sum Bill vilja vera við.

Men sjálvandi: í Miðøld var kristindómurin nógv sterkari, tí tá spældi óttin – gudsóttin – ein nógv størri leiklut, og Pávin stýrdi, fólk kendu sítt pláss osfr. Ikki so?

Nei altóða-/alheimsgerðin er ein tilgongd sum er í gongd, og sjálvandi er tað upp til tær einstøku tjóðirnar, hvussu skjótt og hvussu nógv tær vilja takast uppí hesa tilgongd, men at steðga henni ella ignorera hana, tað er eftir mínum tøkki burturvið. Og um ein tjóð er kristin, so haldi eg, at júst næstakærleikin, meira enn óttin, er ein stak góð dygd at fara inn í alheimin við.

Eitt samfelag bygt á og sum praktiserar næstakærleika er ikki "ryggbrotið".
Næstakærleiki er ikki ein veikleiki.
Kærleiki er altíð ein styrki.
Tann største styrkin í longdini.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13³⁰

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.